# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Karmar og starvslønir til stór ítróttartalent

Føroyingar hava seinastu dagarnar verið vitni til eina stórhending. Bert 17 ára gamli Pál Joensen úr Vági hevur vunnið føroysku tjóðini heili trý evropeisk junior-meistaraheiti í svimjing. Talan er um bæði 1500 metrar frí, 800 metrar frí og 400 metrar frí. Eitt ótrúligt bragd av tí blaðunga vágbinginum, og venjara hansara, Jón Bjarnasyni. Og fara vit í Miðlahúsinum at senda eina tøkk og størstu lukkuynski til Pál Joensen og Jón Bjarnason. Tað hevur verið ein æra og forrættur hjá Miðlahúsinum at sleppa at dekka evropeisku juniorkappingina í svimjing. Eisini ein heilsan og tøkk til Kára á Høvdanum, sum setti fleiri føroysk met, og venjara hansara, Petur Heðin á Fløtti.

Hini londini standa ovfarin og undrandi og spyrja, hvussu ein pinkutjóð kann hava ein svimjara, sum í suverenum stíli vinnur 3 gullheiðursmerki, eisini sæð í ljósinum av, at henda sama tjóðin ikki hevur nakran 50 metrar svimjihyl. Grundarlagið aftanfyri glæsuligu úrslitini hjá Páli, og góðu úrslitini hjá Kára er at finna í svimjihyljum, sum eru 25 metrar og niður í 16,6 metrar. Og talan er um kommunalar hyljar og skúlahyljar, sum svimjifeløgini ikki hava nakran ræðisrætt yvir. Tíðin má verða komin, at svimjarar okkara, sum hava vunnið okkum so nógvan sóma og æru fáa veruligar karmar at virka undir. Lands- og kommunalir politikkarar mugu ikki bara standa og rósa avrikunum hjá okkara framúrskarandi svimjarum, men eisini bera so í bandið, at hesi stóru talentini veruliga fáa altjóða karmar at virka undir. Ein 50 metra svimjihylur hevði eisini kunnað fyrireikað svimjarnar betri til altjóða kappingar. Ein slíkur svimjihylur hevði eisini givið karmar, sum høvdu kunnað framalt enn fleiri stór talent. Tí eigur og má tað verða ein málsetningur, at Føroyar hava ein 50 metra altjóða svimjihyl innan fá ár. Ein slíkur hylur við áskoðaraplássum og venjingarumstøðum hevði eisini opnað fyri møguleikanum, at fleiri stórar altjóða kappingar kundu verið hildnar í Føroyum, so svimjikappar, sum Pál og Kári kundu oftari verið á heima"vølli".

Tíðin er eisini búgvin til at vit taka eitt kjak um týdningin at geva starvslønir ella legat til okkara størstu ítróttartalent innan tær ymisku greinarnar, so hesi veruliga fáa satsað fult í ungdómsárum sínum. Tí betri og virðiligari umboð og betri branding fáa vit ikki sum tjóð. Lat okkum veruliga vísa í verki, at vit fegnast um tað gull tey bera heim til okkum.

**Sosialurin**

## Spurningar til Javnaðarfloksins starvsnevnd



**DAN R. PETERSEN**
fyrrverandi javnaðartingmaður

Í sambandi við at floksleiðslan við grundsjónarmiðunum í hondini gevur formanninum sín fulla stuðul í eini yvirlýsing, sum starvsnevndin hevur skrivað, verða hesir spurningar settir:

Ber tað til at viðgera atfinningar móti formanninum, tá tit samstundis seta forboð ímóti at tosa politikk?

Er tað í samsvar við grundsjónarmiðini, at formaðurin álegði valevnum at verja tann skattalætta, sum var givin há- og miðalinntøkum í síðstu samgongu, meðan smámaðurin bara merkti økt avgjaldstrýst?

Er tað í samsvar við grundsjónarmiðini, at tann progressivi skatturin minkar lutfalsliga, meðan avgjaldsokið herðist munandi, og tær breiðastu herðarnar ikki longur bera tær tyngstu byrðarnar (samb. Búskaparráðið), uttan at henda gongd hevur fingið nakra politiska viðgerð í flokkinum?

Er tað í samsvar við grundsjónarmiðini, at alt "arvasilvurið" undir javnaðarleiðslu varð privatiserað, uttan hetta fekk nakra politiska viðgerð í flokkinum?

Er tað í samsvar við grundsjónarmiðini, at veikir sjúklingar liva í óvissu um lívsneyðugt medisin vegna alment pengatrot, samstundis sum formaðurin ætlar at skerja blokkstuðulin?

Er tað í tráð við andan í grundsjónarmiðunum, at Gerhard Lognberg sum einasti javnaðartingmaður varð hildin burtur frá sjónvarpinum í valstríðnum?

Er tað í tráð við andan í grundsjónarmiðunum, at nøkur útvald valevnir í valstríðnum fingu heilsíðulýsingar fyri nógvar 10-tals túsund kr. goldnar av flokkinum umframt aðrar sømdir, meðan Gerharð og hini, ið ikki vóru í krithúsinum hjá formanninum, noyddust at gjalda slíkt tilfar sjálvi?

Nær eru grundsjónarmiðini á www.j.fo, sum kennast mær púra fremmand, einkisigandi og tannleys, samtykt á landsfundi, og nær eru tey gomlu avtikin?

Er tað í samsvar við grundsjónarmiðini, at Jóannes Eidesgaard floksformaður á landsfundi á Svangaskarði 2005 avlýsti klassakampin?

## Altjóða sáttmálin um rættindi teirra brekaðu



**HEÐIN D. POULSEN**
landsnevndarlimur

Sjálvstýri merkir at vit stýra sjálvi. Vit mugu velja ávirkan og politikk fyrst og fremst.

Skal eg sum landsnevndarlimur taka undir við, at Sjálvstýrisflokkurin fer undir skipa samstarv við samgonguna, fari eg at leggja áherðslu á, at altjóða sáttmálin um rættindi teirra brekaðu verður lagdur fyri Løgtingið og samtyktur í ár. Hetta lovaði Sjálvstýrisflokkurin eisini í valskrá síni til veljarans á løgtingsvalinum.

Løgfrøðiliga forðar einki fyri, at Føroya Løgting samtykkir at staðfesta sáttmálan, hvørki sambært ásetingunum í sáttmálanum ella sambært føroyskari lóg. Eftir at sáttmálin er settur í gildi fyri Føroyar, hava føroyskir myndugleikar eina tvey ára freist, áðrenn fyrsta frágreiðingin skal latast ST um, hvussu sáttmálin verður fylgdur, og hvørjar framtíðar ætlanirnar eru.

Í bæði ólavsøkurøðuni 2007 og 2008 var løgmaður jaligur fyri at seta sáttmálan í gildi. Tíverri er arbeiðið strandað í einum arbeiðsbólki, mannaður fyrst og fremst av embætisverkinum, og hevur tað víst seg at vera lítil áhugi at arbeiða miðvíst við málinum.

Nú má vera liðugt at súlta málið í nevnd, tí tíðin er búgvin at handla, so Føroyar ikki enn einaferð gerast eftirbátur á tí altjóða økinum.

Sáttmálin er av alstórum týdningi fyri tey sum bera brek; og fyri hvønn dag sum gongur at málið verður súltað, verri verður at koma afturumaftur.

## Lutaseðil hjá Miðlahúsinum

Atgongumerkið til Miðlahúsið á ólavsøku var eisini ein lutaseðil við trimum vinningum. Hesi atgongumerki eru drigin:

Tveir semiflex ferðaseðlar frá Atlantsflog millum Føroyar og Ísland vann nr. 01297

Giting og døgurði fyri tvey á Hotel Tórshavn vann nr. 01200

Skemtbøkurnar hjá Óla P, signeraðar vann nr. 01085




**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13:30

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.